# Umhvørvisdagar í Tó

**Fríggjadagurin, leygardagurin og sunnudagurin vóru Umhvørvisdagar í Tórshavnar kommunu. Sosialurin var runt í býnum og prátaði við fólk, ið luttóku á Umhvørvisdegnum**



## Fólk skilja ikki

*Á bingjuplássinum á Argjum, var lítið og einki burturkast komið inn. Sambært umsjónarmanninum leggja fólk heldur burturkastið við vegjaðaran, sum tey eru von. Kommunan hevði bilar sum koyrdu runt eftir burturkastinum. Vit spurdu umsjónarmannin, um boðskapurin um at skilja burturkastið var komin í gjøgnum. Hann segði, at fólk sum heild ikki hava skilt burturkastið sum er savnað inn. Onkunstaðni hava fólk verið dugnalig at skilja. Men flestu støðini er alt fari í sama posa. T.d. Máling og klæði í einari suggu.*



## HB piltar rudda fyri Danmarksferð



*Í Gomlu Hoyvíkini hittu vit HB piltar, sum vóru farnir við pápunum út at rudda í hugnaligu umhvørvinum. Piltarnir vildu heldur tosa um Limfjords Cup, sum teir skulu spæla í summar, enn um upprudding. Vit fáa 10.000 kr. fyri at rudda her, til at fara til Danmarkar at spæla fótbólt.*

KAUPTHING

Virðisbrævameklarafelag



Vika 18, 2005
www.kaupthing.fo

# Veik lyklatøl

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku vístu lyklatøl úr USA á ein veikari búskap enn væntað. Ordrar eftir haldgóðum vørum, t.d. bilum og hvítvørum, lækkaðu 2,8% í mars (væntað ein hækking á 0,3%). Hesar vørur viðføra vanliga eina lutfalsliga stóra íløgu fyri húsarhaldið. Tí verða tær mettar sum eitt gott barometur fyri keypshuginum hjá brúkaranum, sum stendur fyri 2/3 av amerianska búskapinum.

Í Evropa niðurmetti týska stjórnin búskaparliga vøksturin í 2005 úr 1,6% til 1,0%. Grundgevingin er høga arbeiðsloysið, oljuprísurin og tvørrandi áhugin hjá týskarum at brúka pening. Bæði IMF og ES eru enn meiri dapurskygd. Tey meta, at týski búskapurin einans fer at vaksa við 0,8% í 2005.

Lánsbrævarenturnar metlágar

Í farnu viku sló 10-ára danska rentan øll gomul met og kom heilt niður á 3,44%. Áður hevði 3,52% verið lægsta stigið. Sostatt varð staðfest, at íleggjarar enn eru seru bjartskygdir um lánsbrøv, og einki forðar rentunum at lækka meir.

**Stórt vónbrot frá Novo Nordisk**

Sum heild stóðu partabrøv seg illa í farnu viku. Microsoft kunngjørdi hampuligan roknskap, men fleiri vánaligir roknskapir vóru kunngjørdir, m.a. tann hjá Novo Nordisk. Inntøkurnar hjá Novo vóru ikki eins góðar sum væntað og illa gongur at fáa produktið NovoSeven á marknaðin. Tískil er Novo lækkað heili 14% síðani kunngerðina.

**Hesa vikuna**

Nógv týðandi lyklatøl koma hesa vikuna. Arbeiðsmarknaðarfrágreiðing in úr USA kemur fríggjadagin, og tað koma eisini tøl fyri vinnuálit, umframt at bæði amerikanski og evropiski miðbankin halda rentufund. Partabrøv eru í ringum stima í løtuni, men líkt er til at keypsmøguleikar eru í eygsjón. Oljuprísurin er nevniliga lækkaður, og Microsoft hevur júst almannakunngjørt, at væntaða yvirskotið í 2006 er størri enn greinarar høvdu mett. Hetta hevur fyribils stimbrað keypshugin.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,78 | 1,3% | ↑ |
| JPY | 5,52 | 3,4% | ↑ |
| GBP | 11,04 | 1,3% | ↑ |
| NOK | 0,92 | 0,4% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,28 | 0,3% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 173,80 | 0,5% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 88,24 | 0,0% | → |
| Altjóða Vøkstur | 59,01 | 0,8% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*